## Ein dyst á hvørjum vølli

FSF hevur nú gjørt av, hvar teir báðir heimadystirnir í ár í komandi EM-undankappingini skulu spælast.

Mikudagin tann 16. august verður spælt á Svangaskarði, tá Georgia kemur á vitjan, og byrjar tann dysturin kl. 19.

Leygardagin , 7. oktober, kemur Litava á vitjan, og verður tann dysturin spældir á Tórsvølli klokkan 15.

Atgongumerkjaprísurin til hvønn dystin er 150 kr. fyri vaksin og 50 kr. børn, upplýsir FSF. Mett verður helst ikki, at talan verður um tað stóra trýstið á søluna, tí í øllum førum verða atgongumerki ikki seld í forsølu hesaferð.

**-mørk**



## Gravesen til Manchester

Stórvask stendur fyri framman í Real Madrid. Ein av spælarunum, sum roknað verður við, stendur fyri skotum, er danski Thomas Gravesen, og nógv bendir nú á, at Manchester í Onglandi verður næsti heimbýur hansara. Enn er tó ikki greitt, um tað verður til City ella United, at leiðin gongur, tí bæði liðini hava sýnt spælaranum stóran áhuga. Longu í vetur royndi Alex Ferguson at fáa fatur á danska miðvallaranum, og hesum er hann enn áhugaður í. Hinvegin vil Stuart Pearce hava fatur í einum sterkum miðvallara, nú hann eftir øllum at døma noyðist at selja Joey Barton, og boðini til Gravesen eru greið: - Kemur tú til okkara, verður tú fastur maður á miðvøllinum, sigur Stuart Pearce.

**-mørk**

# Hugsa longu um oyggjaleikir

**Føroya Triathlon Felag skipaði seinasta sunndag fyri 1/4 triathlon. Hetta sum liður í fyrireikingunum Oyggjaleikirnar, sum verða á Rhodos um gott ár**

TRIATHLON

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um kapping á sonevnda OL-teininum, sum er 1500 m svimjing, 40 km súkkling og 10 km renning.

Einasta kvinnan í kappingini gjørdi bart í svimjingini. Súsanna Skylv Sørensen var nógv skjótast um at svimja teir 1500 m, og var hon eisini fyrst út á súkkluna. Gunnar Dahl Olsen var næstur úr hylinum, men í fyrsta skiftinum bleiv hann yvirhálaður av Evald Rasmussen. Gunnar er tó somikið sterkur á súkkluni, at hann hevði fingið bæði Súsonnu og Evald aftur, tá komið var til Kaldbaksbotn.



*Súsanna Skylv Sørensen var einasta kvinnan í kappingini, men hon stóð tó einki aftan fyri menninar, tá kappast varð*

Beinir Rasmussen, sum ikki hevur vant nakað serligt í seinastuni, var fjórði skjótastur úr hylinum, men í súkklingini fóru bæði Andrass Joensen og Áslakkur Nesá fram um hann í Kaldbak.

Gunnar var eisini skjótastur í renningini, og kom fyrstur um málstrikuni. Síðani kom Andrass, sum var farin fram um Evald, tá teir høvdu runnið 1,5 km. Súsanna var beint aftanfyri teir, og stutt aftan fyri hana kom Áslakkur. Síðstur á mál var Beinir, sum brúkti dagin sum venjing.

### Til Íslands at kappast

Í næstum fara 10 føroyskir íðkarar til Íslands, har tey skulu taka lut í kappingini um íslendska meistaraheitið. Hetta eftir innbjóðing frá íslendska triathlon-sambandinum. Talan er um fyrstu fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar á Rhodos, har Føroyar avgjørt ætla sær umboðan. Krøvini til lutøtku eru tó munandi herd í mun til tað, sum áður hevur verið galdandi, og tí er longu nú ein neyv venjingar- og kappingarætlan løgd.

Tey, sum fara til Íslands at kappast, eru Evald Rasmussen, Áslakkur Nesá, Beinir Rasmussen, Gunnar Dahl Olsen, Eil Christiansen og Andrass Joensen, Eyvind Akraberg Hansen, Joan Bláfoss, Súsanna Skylv Sørensen og Anna Karina Ottosen.

**Úrslit, 1/4 Triathlon**

| Navn/partur | Svimjing | 1. skift | Súkkling | 2. skift | Renning | Samlað tíð |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gunnar Dahl-Olsen | 0:24:15 | 0:04:49 | 1:06:54 | 0:00:47 | 0:42:35 | 2:19:20 |
| Andrass Joensen | 0:27:43 | 0:04:12 | 1:14:50 | 0:00:39 | 0:44:16 | 2:31:40 |
| Evald Rasmussen | 0:24:50 | 0:01:52 | 1:19:38 | 0:00:58 | 0:46:21 | 2:33:39 |
| Súsanna S. Sørensen | 0:22:42 | 0:02:48 | 1:21:15 | 0:00:49 | 0:46:51 | 2:34:25 |
| Áslakkur Nesá | 0:31:05 | 0:04:01 | 1:15:00 | 0:00:52 | 0:45:42 | 2:36:40 |
| Beinir Rasmussen | 0:26:00 | 0:02:07 | 1:25:36 | 0:00:42 | 1:05:02 | 2:59:27 |

**formuladeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 8 | 5 | - | 2 | - | 1 | 14 | 9 | 5 | 17 |
| 2 KÍ | 8 | 4 | - | 4 | - | 0 | 17 | 8 | 9 | 16 |
| 3 GÍ | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 14 | 8 | 6 | 15 |
| 4 B36 | 8 | 4 | - | 3 | - | 1 | 11 | 8 | 3 | 15 |
| 5 HB | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 22 | 11 | 11 | 14 |
| 6 NSÍ | 8 | 4 | - | 2 | - | 2 | 17 | 11 | 6 | 14 |
| 7 VB/S | 8 | 2 | - | 0 | - | 6 | 9 | 25 | -16 | 6 |
| 8 Skála | 8 | 1 | - | 2 | - | 5 | 10 | 11 | -1 | 5 |
| 9 B68 | 8 | 1 | - | 2 | - | 5 | 7 | 16 | -9 | 5 |
| 10 ÍF | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 10 | 24 | -14 | 3 |

FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umfram vanligan SMS-takst.*






ATLANTIC AIRWAYS

*Hvar er bólturin?*

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.